# Grannskoðaraeftirlitið

## Ársfrágreiðing

## Fyri tíðarskeiðið 2022-2023

**Grannskoðaraeftirlitið**
Sigmundargøta 13*
FO-110 Tórshavn
Postrúm 264
skr@vs.fo

*Skráseting Føroya er avgreiðslustova (sekratariat) hjá Grannskoðaraeftirlitinum.

# Innihaldsyvirlit

1. Inngangur .......... 2
2. Lógargrundarlag .......... 2
2.1 Grannskoðaraeftirlitið .......... 3
2.2 Skrá yvir góðkend grannskoðaravirkir .......... 3
3. Virksemið hjá Grannskoðaraeftirlitinum .......... 5
3.1 Góðskueftirlit .......... 6
3.2 Tá ið góðskueftirlitið er komið at enda .......... 7
3.3 Leiðreglur fyri góðskueftirlit .......... 8
4. Høvuðstættirnir frá góðskueftirlitunum í 2022 .......... 8
5. Avgerðir Grannskoðaraeftirlitsins í 2022 .......... 10

## 1. Inngangur

Grannskoðaraeftirlitið almannakunnger við hesum árligu frágreiðingina um virksemi sítt í tíðarskeiðnum frá 1. januar 2022 til 31. desember 2023.

Grannskoðaraeftirlitið hevur gjørt av at leggja ársfrágreiðingarnar fyri 2022 og 2023 saman. Orsøkin til hetta er, at góðskueftirlitini fyri 2022 ikki vórðu liðug fyrr enn um miðjan 2023, og at góðskueftirlitini fyri 2023 enn ikki eru heilt liðug viðgjørd.

Grannskoðaraeftirlitið hevur gjørt av, at broyta leistin fyri ársfrágreiðingum. Góðskueftirlitini fara fram um heystið, og tað hevur víst seg, at verið torført, at fáa málini liðug í sama ári. Til dømis um eitt eftirlit er í september, so er viðgerðin av góðskueftirlitsfrágreiðingum ofta ikki liðug fyrr enn um várið ella summarið árið eftir. Eftir tí gamla leistinum, varð bíðað við ársfrágreiðingini, til eftirlitið varð liðugt viðgjørt. Hetta viðførdi ofta, at ársfrágreiðingin ikki kom út fyrr enn um summarið ella heystið árið eftir. Nú er avgjørt, at ársfrágreiðingin bert skal fevna um tað virksemi, sum er í tí ávísa árinum, og at bíðað verður ikki eftir, at viðgerðin av eftirlitinum er liðug. Henda ársfrágreiðing er gjørd eftir nýggja leistinum, og væntast kann, at hesin leistur verður fylgdur frameftir.

Grannskoðaraeftirlitið hevði 6 fundir í 2022, og 8 fundir í 2023.

Hetta er ellinta ársfrágreiðingin hjá Grannskoðaraeftirlitinum. Ársfrágreiðingin verður almannakunngjørd á heimasíðuni hjá Skráseting Føroya: https://www.skraseting.fo/

## 2. Lógargrundarlag

Grannskoðaraøkið er undir tættari altjóða regulering, heruppií í ES. Politiskt er gjørt av, at Føroyar skulu fylgja hesum reglum. Føroyska lógargrundarlagið hevur tað danska sum fyrimynd, við teimum frávikum, sum føroysk viðurskifti gera neyðug.

Niðanfyri er yvirlit yvir føroyska regluverkið pr. 31. desember 2023:

- Løgtingslóg nr. 50 frá 4. mai 2021 um serligar treytir fyri lógarálagdari grannskoðan av fyritøkum av almennum áhuga. (PIE-fyriskipanin)
- Løgtingslóg nr. 45 frá 11. mai 2009 um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31. frá 9. mars 2023. (Grannskoðaralógin)
- Kunngerð nr. 138 frá 18. oktober 2021 um óheftni hjá góðkendum grannskoðarum og grannskoðanarvirkjum.
- Kunngerð nr. 128 frá 24. august 2021 um kravda eftirútbúgving fyri góðkendar grannskoðarar.
- Kunngerð nr. 123 frá 26. juli 2019 um grannskoðaraváttanir o.a., sum broytt við kunngerð nr. 139 frá 18. oktober 2021.
- Kunngerð nr. 121 frá 23. august 2022 um próvtøku o.a. fyri góðkendar grannskoðarar
- Kunngerð nr. 11 frá 2. februar 2022 um góðskueftirlit og virksemi Grannskoðaraeftirlitsins.
- Kunngerð nr. 120 frá 23. august 2022 um Grannskoðaranevndina.

- Kunngerð nr. 86 frá 2. juli 2012 um starvsskipan fyri Grannskoðaraeftirlitið, sum seinast broytt við kunngerð nr. 136 frá 23. september 2021.
- Kunngerð nr. 25 frá 6. apríl 2011 um skrá yvir góðkend grannskoðanarvirkir og yvir góðkendar grannskoðarar, sum broytt við kunngerð nr. 71 frá 21. mai 2012.
- Kunngerð nr. 92 frá 6. september 2010 um grannskoðaravirksemi.
- Kunngerð nr. 113 frá 7. september 2009 um fígging av Grannskoðaraeftirlitinum og kanningar- og dissiplinerskipanini.
- Kunngerð nr. 5 frá 14. januar 2009 um trygd og ábyrgdartrygging fyri løggildar og skrásettar grannskoðarar.

Lógargrundarlagið á grannskoðaraøkinum í Føroyum hevur sína fyrimynd í danskari lóggávu, tó við nøkrum tillagingum. Eitt nú er gjørt av at varðveita skipanina við einum serligum Grannskoðaraeftirlitið, hóast Revisortilsynet varð tikið av í Danmark. Í Danmark verður viðgerðin av frágreiðingum um góðskueftirlit á góðkendum grannskoðaravirkjum framd beinleiðis av Erhvervsstyrelsen.

## 2.1 Grannskoðaraeftirlitið

Skráseting Føroya setur Grannskoðaraeftirlitið. Starvs- og fundarskipan Grannskoðaraeftirlitsins er sett í kunngerð nr. 86 frá 2. juli 2012 um starvsskipan fyri Grannskoðaraeftirlitið, sum seinast broytt við kunngerð nr. 136 frá 23. september 2021.

Skráseting Føroya er skrivstova hjá Grannskoðaraeftirlitinum. Starvsfólk á Skráseting Føroya røkja skrivarauppgávuna hjá Grannskoðaraeftirlitinum.

Limir í Grannskoðaraeftirlitinum frá 1. juli 2021 eru:

- Rannvá Sólheim, forkvinna
- Nina Djurhuus, umboð fyri roknskaparbrúkarar
- Malan Johansen, umboð fyri roknskaparbrúkarar
- Eyðfinn Olsen, við royndum og útbúgving innan grannskoðan og roknskapargreiðslu
- Teitur Samuelsen, við royndum og útbúgving innan grannskoðan og roknskapargreiðslu

## 2.2 Skrá yvir góðkend grannskoðaravirkir

- P/F Januar, løggilt grannskoðanarvirki, skrás. nr. 5821
- Sp/f SPEKT, løggildt grannskoðanarvirki, skrás. nr. 2732
- Sp/f NUMO, góðkent grannskoðanarvirki, skrás. nr. 5698
- Sp/f Agnar á Dul, skrásett grannskoðanarvirki, skrás. nr. 5806
- Sp/f Grannskoðarastovan, skrásett grannskoðanarvirki, skrás. nr. 3868
- Sp/f MENTA, skrásett grannskoðanarvirki, skrás. nr. 5029
- Sp/f Roknskaparfelagið, skrásett grannskoðanarvirki, skrás. nr. 2212

**Góðkend grannskoðanarvirkir í Føroyum**




*Myndin vísir talið av góðkendum grannskoðanarvirkjum (løggildum og skrásettum grannskoðanarvirkjum) í 2010, 2012, 2015, 2018, 2021 og 2023.*

**Góðkendir grannskoðarar í Føroyum**




*Myndin vísir talið av góðkendum grannskoðarum, býtt á løggildir og skrásettir grannskoðarar. Síðani broytingina í grannskoðaralógini í 2016 hevur tað ikki longur verið møguligt at gerast skrásettur grannskoðari[1].*

[1] Sí tó serligu skiftisreglurnar í løgtingsmáli 107/2014.

## 3. Virksemið hjá Grannskoðaraeftirlitinum

Yvirskipaða virksemið hjá Grannskoðaraeftirlitinum er ásett í §§ 32 – 34 í grannskoðaralógini, meðan nærri reglur fyri virksemi Grannskoðaraeftirlitsins eru ásettar í kunngerð nr. 11 frá 2. februar 2022 um góðskueftirlit og virksemi Grannskoðaraeftirlitsins.

Høvuðsuppgávan hjá Grannskoðaraeftirlitinum er at skipa fyri góðskueftirliti hjá góðkendu grannskoðanarvirkjunum. Endamálið við góðskueftirlitinum er at gera eina meting av góðskustýringarskipanini, umframt arbeiðið og óheftnið í samband við, at grannskoðaravirkið letur váttanir við trygd, til dømis grannskoðaraátekning á ársfrágreiðingar hjá fyritøkum, sum skulu grannskoðast samsvarandi ársroknskaparlógini.

Góðskueftirlit verða ikki framd á hvørjum ári, tó skulu góðskueftirlit sambært Grannskoðaralógini fara fram við í mesta lagi hesum millumbilum:

| | |
|---|---|
| **Grannskoðanarvirkir, ið grannskoða stórar fyritøkur av almennum áhuga**[2]: | Í mesta lagi 3 ár. |
| **Grannskoðanarvirkir, ið grannskoða smáar og miðalstórar fyritøkur av almennum áhuga**: | Í mesta lagi 6 ár. |
| **Grannskoðanarvirkir, ið grannskoða miðalstórar og stórar fyritøkur, ið ikki eru fevndar av hugtakinum "almennum áhuga"**: | Í mesta lagi 6 ár. |
| **Grannskoðanarvirkir, ið grannskoða smærri fyritøkur, ið ikki eru fevndar av hugtakinum "almennum áhuga"**: | Millumbilið verður ásett samsvarandi einari váðameting. |

Sambært grannskoðaralógini skal Grannskoðaraeftirlitið útnevna teir grannskoðarar, sum kunnu fremja góðskueftirlit fyri eitt 5 ára tíðarskeið. Góðskueftirlitsfólkini skulu hava hóskandi yrkisútbúgving og viðkomandi royndir innan grannskoðan og roknskapargreiðslu og hava neyðugan kunnleika til góðskueftirlit. Higartil hevur Grannskoðaraeftirlitið útnevnt danskar løggildar grannskoðarar, sum Erhvervsstyrelsen hevur góðkent, til at gera góðskueftirlit á teimum smærru grannskoðanarvirkjunum í Føroyum.

Góðskueftirlit á størri grannskoðanarvirkjum, sum grannskoða fyritøkur av almennum áhuga (PIE-fyritøkur), verður framt av starvsfólkum í Erhvervsstyrelsen. Politiskt er komið ásamt um, at Erhvervsstyrelsen í samstarvi við Grannskoðaraeftirlitið skal røkja hesa uppgávu viðvíkjandi teimum føroysku grannskoðanarvirkjunum, sum grannskoða fyritøkur av almennum áhuga í Føroyum.

Til at fíggja raksturin av Grannskoðaraeftirlitinum og kanningar- og dissiplinerskipanina, innkrevur Skráseting Føroya eitt árligt gjald frá øllum góðkendum grannskoðarum, sum eru knýttir at einum grannskoðanarvirki pr. 1. januar í innkrevjingarárinum[3]. Útreiðslurnar í samband við ítøkilig góðskueftirlit verða bornar av

[2] Fyritøkur av almennum áhuga ("Public Interest Entities" ella stytt "PIE") eru nærri lýstar í § 1 a, stk. 1, nr. 3 í grannskoðaralógini. Talan er um fyritøkur, ið eru skrásettar á einum keypsskála í einum ES- ella EBS-landi, og fíggjarfyritøkur. Fleiri krøv verða sett til grannskoðanina av hesum sløgum av fyritøkum.

[3] Sí kunngerð nr. 113 frá 7. september 2009 um fígging av Grannskoðaraeftirlitinum og kanningar- og dissiplinerskipanini.

kannaða grannskoðanarvirkinum[4]. Nærri reglur viðvíkjandi uppgerð av kostnaðinum og samsýning eru ásettar í leiðreglunum hjá Grannskoðaraeftirlitinum fyri góðskueftirlit[5].




*Myndin vísir talið av góðskueftirlitum í tíðarskeiðnum 2011-2023. Eftirlitini í 2011-2012 vórðu skipaði sum tænastueftirlit[6], og eftirlitini í 2013 vóru uppfylgjandi tænastueftirlit. Í 2015, 2018 og 2021 vórðu ongi góðskueftirlit framd. Góðskueftirlitini í 2023 eru ikki liðug viðgjørd.*

## 3.1 Góðskueftirlit

Sambært § 26 í grannskoðaralógini, eru øll grannskoðanarvirkir áløgd at hava eina góðskustýringarskipan, og skulu skjalprógva, at henda verður nýtt.

Sambært 27, stk. 2 í grannskoðaralógini, fevnir góðskueftirlitið um eina meting av góðskustýringarskipanini, og um arbeiðið og óheftnið í sambandi við tær uppgávur, sum grannskoðarin ger. Uppgávurnar eru m.a. at geva grannskoðanarátekningar á roknskapir, heruppií tá grannskoðarin ummælir leiðslufrágreiðingar sambært ársroknskaparlógini[7], og tá grannskoðarin gevur aðrar váttanir við trygd, ið ikki einans eru ætlaðar til egna nýtslu hjá tí, sum hevur biðið um tær.

---

[4] Sí kunngerð nr. 11 frá 2. februar 2022 um góðskueftirlit og virksemi Grannskoðaraeftirlitsin.

[5] Skjølini eru tøk á heimasíðu Skráseting Føroya: https://www.skraseting.fo/fo/grannskodarar/grannskodaraeftirlitid/leidreglur-2023

[6] At talan var um tænastueftirlit merkti, at Grannskoðaraeftirlitið frammanundan eftirlitið hevði tikið avgerð um, at einki mál skuldi leggjast fyri Grannskoðaranevndina, uttan í teimum førum, har kannaða grannskoðaravirkið onga góðskustýringsskipan hevði, og ikki hevði í umbúna at fáa sær slíka. Einki mál var lagt fyri Grannskoðaranevndina í hesum tíðarskeiði.

[7] Anordning nr. 1355 af 9. december 2007 om ikrafttræden for Færøerne af årsregnskabsloven, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 9. mars 2023.

Góðskueftirlitið skal kanna, um grannskoðanarvirkini hava eina skipan, sum livir upp til krøvini í grannskoðaralógini og ásetingum annars, heruppií góðskustýringsstandardinum ISQC 1 *"Kvalitetsstyring i firmaer, som udfører revision og review af regnskaber, andre erklæringsopgaver med sikkerhed samt beslægtede opgaver"* og ISA 220 *"Kvalitetsstyring ved revision af regnskaber"*. Harumframt skal góðskueftirlitið vísa, at skipanin verður brúkt. Hetta verður gjørt við stakroyndum, har grannskoðarin hevur givið grannskoðanarátekningar ella aðrar váttanir við trygd.

Talið av grannskoðaraátekningum og øðrum váttanum við trygd, sum skulu takast út til stakroyndaeftirlit, fer fram lutfalsliga í mun til samlaða talið av grannskoðaraátekningum og øðrum váttanum við trygd, sum grannskoðaravirkið hevur latið í undanfarna ári. Ítøkiligar váttanaruppgávur, sum skulu takast út til stakroyndaeftirlit, verða valdar samsvarandi einari váðameting, har støða eisini skal takast til slag og vav av teimum váttanaruppgávum, sum grannskoðaravirkið hevur latið. Sum meginregla verða einans váttanaruppgávur, ið eru latnar innan seinastu 12 mánaðirnir, tiknar út til stakroyndaeftirlit. Nærri reglur hesum viðvíkjandi eru ásettar í leiðreglunum fyri góðskueftirlit, sum eru tøkar á heimasíðuni hjá Skráseting Føroya.

Tá ið góðskueftirlit fer fram á einum grannskoðanarvirki, skal virkið geva Grannskoðaraeftirlitinum og góðskueftirlitsfólkunum høvi til at gera tær kanningar, ið mettar vera neyðugar, og skal syrgja fyri, at Grannskoðaraeftirlitið og góðskueftirlitsfólkið fáa tær upplýsingar og ta hjálp, ið verður mett neyðug til tess at fremja góðskueftirlitið.

Grannskoðarar, ið eru knýttir at grannskoðanarvirkinum, hava samsvarandi skyldu mótvegis Grannskoðaraeftirlitinum og góðskueftirlitsfólkunum. Grannskoðaraeftirlitið kann biðja góðskueftirlitsfólkið og grannskoðanarvirkið um tey skjøl og ta hjálp, sum Grannskoðaraeftirlitið metir vera neyðugt, til tess at eftirlitið kann taka støðu til, um tað hjá tí kannaða eru skeivleikar, manglar ella øki, har ábøtur kunnu verða gjørdar.

Tá ið góðskueftirlitið er endað, skal góðskueftirlitsfólkið gera eina frágreiðing, ið skal sendast til Grannskoðaraeftirlitið, og sum verður nýtt sum grundarlag undir avgerðini, sum Grannskoðaraeftirlitið tekur í sambandi við góðskueftirlitið.

Í frágreiðingini skal vera ein lýsing av, hvat er kannað, slagið og vavið av kanningini, ein meting av góðskustýringarskipanini, umframt fremjanini av váttanaruppgávum, og óheftni í sambandi við slíkar uppgávur. Góðskueftirlitsfólkið skal í frágreiðing síni vísa á teir skeivleikar, og á møgulig brot á lóggávuna, sum komið er fram á í sambandi við góðskueftirlitið. Eisini skal góðskueftirlitsfólkið, í tann mun hetta er viðkomandi, gera tilmæli til grannskoðanarvirkið um, hvussu viðurskiftini kunnu fáast í rættlag.

## 3.2 Tá ið góðskueftirlitið er komið at enda

Tá ið eitt góðskueftirlit er komið at enda, skal Grannskoðaraeftirlitið viðgerða frágreiðingina við tí fyri eyga at staðfesta, um frágreiðingin gevur høvi til:

1. at enda eftirlitið uttan onnur tiltøk, ella

2. at taka avgerð um, at góðskueftirlit verður aftur, har tað skal staðfestast, um tilmæli í sambandi við undanfarna eftirlitið eru komin í rættlag.

Í tann mun góðskueftirlitsfrágreiðingin vísir, at viðurskifti eru, sum eiga at vera fingin í rættlag, verður grannskoðanarvirkið vanliga biðið um at gera eina virkisætlan, ið verður grundarlag undir næsta góðskueftirlitinum. Virkisætlanin skal, sambært leiðreglunum hjá Grannskoðaraeftirlitinum, í minsta lagi innihalda eitt yvirlit yvir átøk, ið eru sett í verk, ella sum skulu setast í verk til tess at bøta um viðurskiftini, viðkomandi ábyrgdarpersónar og eina tíðarætlan. Grannskoðaraeftirlitið skal góðkenna virkisætlanina.

Harumframt kann Grannskoðaraeftirlitið, um góðskueftirlitsfrágreiðingin ella viðurskiftini annars geva orsøk til tess, gera av at leggja mál hjá einum grannskoðanarvirki inn fyri Grannskoðaranevndina. Grannskoðaranevndin er serliga dissiplinerskipanin fyri góðkend grannskoðanarvirkir og góðkendar grannskoðarar. Grannskoðaranevndin kann eitt nú áleggja viðkomandi virki ella grannskoðara bøtur, og/ella taka avgerð um at frádøma góðkenningina sum grannskoðari.

Avgerðir hjá Grannskoðaraeftirlitinum og Grannskoðaranevndini eru endaligar innan fyrisitingina.

### 3.3 Leiðreglur fyri góðskueftirlit

Grannskoðaraeftirlitið skal gera nærri leiðreglur fyri góðskueftirlit, sum áseta nærri hvat góðskueftirlitið á grannskoðanarvirkjum skal fevna um, heruppií tá ið talan er um góðskueftirlit á grannskoðanarvirkjum, sum grannskoða fyritøkur av almennum áhuga. Fyrstu leiðreglurnar fyri góðskueftirlit vórðu gjørdar í 2011, og tóku tær støði í leiðreglunum hjá Erhvervsstyrelsen frá 2010. Síðani eru árligar dagføringar gjørdar av leiðreglunum samsvarandi teimum broytingum, sum gjørdar eru í donsku leiðreglunum, tó við nøkrum tillaginum í mun til føroysk viðurskifti og lóggávu.

Leiðreglurnar hjá Grannskoðaraeftirlitinum fyri 2023 taka støði í donsku leiðreglunum fyri 2022, við nøkrum tillagingum, serliga vegna munir í føroyskari og danskari lóggávu. Broytingarnar í leiðreglunum fevna í høvuðsheitinum um, at brot 2.3.3.1 í leiðreglunum er útbygt nakað, eins og nakrir spurningar eru lagdir afturat fylgiskjølunum 2 og 3. Væntast kunnu fleiri broytingar í leiðreglunum fyri 2024.

Leiðreglurnar og tey skjøl, sum góðskueftirlitsfólkini skulu nýta í samband við góðskueftirlit, liggja frammi á heimasíðuni hjá Skráseting Føroya[8].

## 4. Høvuðstættirnir frá góðskueftirlitunum í 2022

Í 2022 skipaði Grannskoðaraeftirlitið fyri einum eftirliti á einum løggildum grannskoðaravirki, og tveimum eftirlitum á skrásettum grannskoðaravirkjum. Í 2023 skipaði Grannskoðaraeftirlitið fyri trimum góðskueftirlitum á skrásettum grannskoðaravirkjum. Viðgerðin av eftirlitunum fyri 2023 er enn ikki liðug.

Yvirskipaða niðurstøðan viðvíkandi góðskueftirlitunum í 2022 var, at grannskoðanarvirkini hava sett í verk og brúka eina hóskandi góðskustýringarskipan. Góðskueftirlitsfólkini eru heldur ikki komin fram á tilfelli, har góðkendur grannskoðari ikki lýkur krøvini í grannskoðaralógini viðvíkjandi eftirútbúgving.

[8] Sí leinkju: https://www.skraseting.fo/fo/grannskodarar/grannskodaraeftirlitid

Grannskoðaraeftirlitið og Skráseting Føroya hava í nøkrum førum fingið fráboðanir um ymiskar praktiskar avbjóðingar, sum hava stungið seg upp í sambandi við góðskueftirlit. Fráboðanirnar koma bæði frá góðskueftirlitsfólkunum og frá kannaðu grannskoðaravirkjunum.

Skráseting Føroya hevur í nøkrum førum víst á, at gongdin at enda góðskueftirlitini hevur verið ov langrøkin, serliga orsaka av umbønum frá grannskoðaravirkjum um at leingja freistirnar. Tað eru ymiskar orsøkir til, at hetta kemur fyri, m.a. orsaka av samskiftismistøkum, vegna persónlig viðurskifti, orsaka av munum í danskari og føroyskari lóggávu, og orsaka av, at góðskueftirlitsfólkini hava havt nógvar viðmerkingar til kannaða grannskoðaravirkið.

Grannskoðaraeftirlitið og Skráseting Føroya arbeiða miðvíst við, at góðskueftirlitini verða avgreidd so skjótt og væl sum til ber. Ein fortreyt fyri hesum er, at bæði góðskueftirlitsfólk og tað kannaða grannskoðanarvirki arbeiða miðvíst við eftirlitinum og harafturat, at myndugleikarnir hava eitt tætt samskifti við viðkomandi partar. Grannskoðaraeftirlitið hevur eisini, í minsta lagi ein árligan fund við Felagið Føroyskir Grannskoðarar, eins og loypandi samskifti er við tey grannskoðaravirki, sum skulu til góðskueftirlit.

Í mun til góðskueftirlitsvitjaninar í 2022 hava góðskueftirlitsfólkini havt ymiskar eygleiðingar og tilmælir um batar, eitt nú:

- Grannskoðanarvirki hava fingið til vega góðskustýringsskipanir, men tað er ymiskt í hvønn mun skipanirnar verða nýttar.
- Grannskoðanarvirki hevur ikki skipað fyri nøktandi frálæru av starvsfólkunum. Starvsfólk á grannskoðanarvirkjum skulu hava frálæru í ymiskari serlóggávu, sum er viðkomandi fyri grannskoðarayrkið, eitt nú frálæru í trygdarhandbókini, um fyribyrgjan av hvítting/búskaparligum brotsverkum, um varskógvaraskipanina og um verju av óheftni grannskoðarans.
- Grannskoðanarvirkið hevur ikki gjørt nøktandi skrivligar váðametingar, politikkir, mannagongdir ella eftirlitsskipanir sambært hvítvasklóggávuni til tess at stýra váðanum fyri, at grannskoðaravirkið kann verða misnýtt til at fremja hvítting ella fígging av yvirgangi.
- Grannskoðari hevur ikki gjørt nøktandi grannskoðararáðlegging, og/ella onki skjalprógv er fyri, at grannskoðararáðlegging er framd. Í summum førum er grannskoðararáðlegging framd, men grannskoðarin hevur ikki útint eina ella fleiri gerðir, sum eru ásettar í grannskoðaraætlanini, og ongin skrivlig viðmerking er um, hví gerðin ikki er viðkomandi at útinna.
- Grannskoðari hevur ikki skjalprógvað at hava gjørt nøktandi metingar av óheftni í sambandi við útinnan av øðrum uppgávum enn grannskoðan.
- Grannskoðari hevur ikki í nøktandi mun fyrihildið seg til ella ført prógv fyri eini røð av brotum á ársroknskaparlógina, og/ella grannskoðari hevur ikki fyrihildið seg til, hvørt brot á ársroknskaparlógina hevur týdning fyri, hvussu átekningin verður orðað.
- Grannskoðari hevur ikki goymt skjalprógv fyri virðismetingum í samband við grannskoðan av áogn í atknýttum feløgum.
- Grannskoðarin hevur ikki goymt skjalprógv fyri, at hann hevur verið á fysiskum eftirliti á vørugoymsluni hjá grannskoðaðu fyritøkuni.
- Grannskoðari hevur gjørt váðametingar, neyðugar grannskoðaragerðir ella hevur goymt grannskoðaraprógv, sum ikki er nøktandi.

- Grannskoðari setir fram eftirfylgjandi munnligar frágreiðingar. Tað er sum meginregla ikki nøktandi, tí metingar skulu skjalfestast í arbeiðspappírunum í góðskustýringsskipanini.

Viðmerkjast skal, at nøkur av hesum viðurskiftum ikki bert eru afturvendandi fyri kannaðu grannskoðaravirkini í 2022, men eisini eru afturvendandi ár um ár[9].

## 5. Avgerðir Grannskoðaraeftirlitsins í 2022

Grannskoðaraeftirlitið hevur gjørt av, at góðskueftirlit verður aftur hjá tveimum grannskoðaravirkjum, har tað skal staðfestast, um tilmælini í sambandi við undanfarna eftirlitið eru komin í rættlag, sbrt. § 33, stk. 6, nr. 2 í grannskoðaralógini.

Í einum føri hevur Grannskoðaraeftirlitið gjørt av, at eftirlitið verður endað uttan onnur tiltøk, sbrt. § 33, stk. 6, nr. 1 í grannskoðaralógini.

Kannaðu grannskoðaravirkini eru biðin um at lata Grannskoðaraeftirlitinum eina virkisætlan, har vísast skal á tey tiltøk, sum eru ella skulu setast í verk fyri at fáa tey viðurskifti, sum góðskueftirlitsfólkini hava víst á, í rættlag, sbrt. § 33, stk. 7 í grannskoðaralógini.

Grannskoðaraeftirlitið metir, at góðskueftirlitsfrágreiðingarnar fyri 2022 ikki geva Grannskoðaraeftirlitinum orsøk til at leggja nakað mál fyri Grannskoðaranevndina.

Tórshavn, 23. februar 2024

Vegna Grannskoðaraeftirlitið

Rannvá Sólheim

Forkvinna

[9] Sí til dømis ársfrágreiðinga hjá Grannskoðaraeftirlitinum fyri 2020 og 2021, brot 4.5.